## Anelka gevur ikki upp

Eftir 3-1 sigurin hjá Chelsea á Watford í FA Cup-kappingini, segði Nikolas Anelka, at hann roknar við, at Chelsea nú veruliga fær glið á sítt spæl. – Vit hava havt eina trupla tíð, men vit hava víst styrki. Tað er altíð trupult, tá tú skiftir venjara, men vónandi var hesin sigurin tað, sum skuldi til fyri at venda gongdini, segði Anelka.



## Terry skal ongan veg

Ray Wilkins, sum er venjari hjá Chelsea, slær fast, at John Terry ikki skal nakran veg úr felagnum. Fleiri av ensku bløðunum hava annars skrivað, at Terry er leiddur av tilveruni á Stamford Bridge, og at Manchester City stendur til reiðar við einum góðum tilboð. – Tað mugu vera nøkur øgiliga rík feløg, sum vilja hava Terry. Men eg rokni ikki við, at hann fer nakran veg. Hann elskar Chelsea, og familja hansara býr eisini her í økinum, so eg dugi ikki at ímynda mær, at hann skal nakran vegi, segði Wilkins við Radio Five Live.

SÍ-Fleyr 3-1 (25-19, 25-21, 22-25, 30-28)

# SÍ vann eitt brak av einari finalu

**Kvinnufinalan leygardagin hevði tað mesta, tú kanst ynskja tær av einari steypafinalu, tí her var talan um tvey lið, ið royndu at vísa seg frá síni bestu síðu. Úrslitið var ein dystur, ið borðreiddi við spenningi, dramatikki og einum næstan endaleysum enda**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*



*Talan var um eitt brak av eini finalu, har báðir partar stríddust til tað seinasta. Men at enda mátti Fleyr tó geva skarvin yvir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Skal fingurin setast á nakað í kvinnufinaluni millum SÍ og Fleyr, so má tað vera, at hon bara hevði fýra sett. Og serliga tað drúgva fjórða settið gjørdi, at tú næstan ynskti Fleyr at vinna tað, tí so høvdu vit fingið eitt sett aftrat við hesum báðum liðunum, ið matsjaðu hvørt annað so væl, at tað var ein frægd at síggja.

Serliga í øðrum setti, tá Fleyr byrjaði at koma meira inn í dystin, var talan um einar tvær duellir, ið mugu kanditera til at vera kanska tær báðar bestu, sum eru sæddar í nakrari kvinnufinalu. Ikki minst, tá SÍ legði seg á odda 8-7, var talan um 100 prosents offurvilja á báðum liðum, ið hvørt í sínum lagi á ótrúligan hátt megnaðu at samla upp og so enntá at leypa á. Tað gekk aftur og fram fleiri ferðir, áðrenn SÍ at enda dró longra stráið og vann bóltin.

Í fyrsta setti vístu SÍ-kvinnurnar, at tær veruliga vildu vaska av sær finalutapið í fjør, tá tær ímóti ÍF fingu ivasama heiðurin sum mest sannførandi taparin í kvinnufinalum higartil. Tá SÍ var á odda 12-7, bað Fleyr um »time-out«, men tað nart ikki við SÍ, sum beinanvegin streyk upp á 17-7, fyri síðani at vinna settið trygt.

### Endaleysa settið

Hóast Fleyr í øðrum setti tóktist fáa betur stýring á spælinum – serliga verjupartinum – átti SÍ munin og megnaði at rista allar álvarsligar hóttanir av sær. Men framstigini hjá Fleyr vóru so eyðsýnd, at tað helst fór at venda í triðja setti, tí tað var eisini ein spurningur, um SÍ kundi orka at herja á við somu øði trý sett á rað.

So var eisini, men hóast Fleyr sat á tí nógva í triðja setti, so var tað um reppið, at SÍ ímóti endanum kom afturíaftur og tók settið og sigurin. Frá at hava verið aftan fyri 14-20, megnaði SÍ at toga seg upp á bæði 21-23 og 22-24, áðrenn Fleyr vann seinasta bóltin og framvegis var á lívi í finaluni.

At bæði liðini nú av álvara høvdu spælt seg heit, bar fjórða settið týðiliga boð um. Liðini skiftust um at vera á odda, og hóast SÍ oftari fór framum, svaraði Fleyr aftur hvørja ferð, so talan gjørdist um eitt satt marathon-sett, ið mestsum ongan enda vildi fáa.

Mitt í settinum hendi so ein feilur við dómaraborðið, sum hevði við sær ein steðg upp á fleiri minuttir, men sjálvt hesa løtuna, meðan bæði lið blivu standandi úti á vøllinum, hekk spenningurin eftir í luftini.

Tá avtornaði, vann SÍ hetta fjórða og avgerandi settið 30-28, men Fleyr fylgdi við heilt til dyrnar og hevði leiðsluna so seint sum til 27-26!

### Tvey góð lið

Frøin á SÍ-kvinnunum og stóru mannfjøldini úr Sørvági var sjálvandi øgilig, tá Fleyr sendi seinasta bóltin út av vøllinum, so SÍ stóð eftir sum steypavinnari. Hetta var tað, tey har vesturi mundu kenna seg snýtt fyri í fjør, tá SÍ av teimum flestu var roknað sum favorittur, men kortini ikki bar boð í bý.

Nú var vent í holuni, men hóast sigurin hjá SÍ sjálvandi var uppiborin – ikki minst orsakað av sera sannførandi spæli tey bæði fyrstu settini – átti Fleyr sín stóra heiður av, at vit fingu eina so góða og spennandi finalu. Tað skulu tvey góð lið til at skapa ein so góðan dyst.

Og hvør veit, um ikki júst hesi bæði liðini hava meira at bjóða, tí í landskappingini andar Fleyr SÍ í nakkan, og ivaleyst fara báðir partar av leggja nógv fyri í Sørvági sunnudagin, tá liðini aftur møtast til toppdyst. Vinnarin av tí dystinum fær í øllum førum ein trumf í hondina, tá tað snýr seg um at taka síðsta stikkið í kappingini um føroyameistaraheitið.

Fyribils má SÍ sigast at hava vunnið sær ein sálarligan fyrimun við sigrinum í steypafinaluni, umframt at SÍ framvegis er oddalið hjá kvinnunum. Steypasigurin var tann fyrsti hjá sørvágskvinnum, sum hesa ferð roynd seg í finaluni fyri aðru ferð, og teimum ynskja vit tillukku við tí!

## Ikki seinasta finalan hjá Fleyr



Ein av royndastu spælarunum hjá Fleyr er Hjørdis Johannesen, sum var í steypafinaluni við KÍF fyri tveimum árum síðani, umframt at hon eisini hevur spælt flogbólt niðri og hevur spælt nógvar landsdystir fyri Føroyar. Hon var sjálvandi vónbrotin eftir finalutapið leygardagin:

– Hetta var øgiliga keðiligt, men vit mugu bara viðganga, at tær vóru betri enn vit í dag, sjálvt um fjórða sett kundi farið báðar vegir. Um tú hyggur at fyrsta og øðrum setti, so vóru tær betri og vunnu dystin uppiborið, sigur Hjørdis, sum heldur, at tapið í fyrstu kvinnufinaluni hjá Fleyr saktans kann brúkast til nakað mennandi og uppbyggjandi.

– Vit kunnu gott brúka hetta til at menna okkum víðari, og tær ungu vístu, at tær koma vit at síggja nógv til framyvir. Eg eri vís í, at Fleyr heilt víst verður ofta at síggja í steypafinaluni komandi árini. Her og nú er so føroyameistaraheitið eftir at kappast um, og har fara vit at vita, um vit ikki kunnu gera ein vørr.

**-hil**